Vikuskiftið Sosialurin

Nr. 92 - 15. mai 2009





# Vovin føroysk klæði í Lítluvík

**Vevkonurnar Joana Bjarnastein og Poulina Jóanesardóttir hava komandi vikuna sølugframsýning við føroyskum klæðum í Smiðjuni í Lítluvík**

FRAMSÝNING

*Eilen Anthoniussen*
*eilen@sosialurin.fo*

Í dag letur sølgframsýning við føroyskum klæðum upp í Smiðjuni í Lítluvík. Tað eru vevkonurnar Joana Bjarnastein og Poulina Jóanesardóttir, ið standa fyri framsýningini. Á framsýningini verður høvi at síggja og ogna sær vovin skjúrtastykki, turri- og fyriklæði í ymiskum litum og við ymiskum mynstrum. Eisini verða dømi við øðrum vovnum pløggum - so sum vovnir vestar og hosubond.

Joana og Poulina hava nomið útbúgving sínar á vevilinjuni á Seminariet for Kunst og Håndværk í Kerteminde. Umframt at tær hava vevstovu, undirvísa tær báðar á kvøldskúlaskeiðum í veving. Harumframt undirvísir Poulina á vevstovuni á Sjóndepilinum.

Framsýningin er opin frá fríggjadegnum 15. mai til mikudagin 20. mai klokkan 10-19.00, tó sunnudag 14-19.00.

# Bjóða ungum arbeiði í summar

TÍÐINDASKRIV

**Nú verður aftur høvi hjá 14 til 16 ára gomlum at melda seg til verkætlanina "Ung í arbeiði" í Tórshavnar kommunu, sum verður í gongd í fýra vikur, frá 29. juni til 24. juli. Eisini kunnu "eldri" ung melda seg til sum bólkaleiðarar hjá teimum yngru.**

At ung sleppa at gera ymiskt fyrifallandi arbeiði, ið hevur til endamáls at fríðka um kommununa, er vorðið ein fastur siður í Tórshavnar kommunu mitt um summarið. Arbeiðið verður skipað soleiðis, at tey ungu sleppa til arbeiðis tvær vikur í part, svarandi til 80 tímar.

Umsøkjararnir skulu vera millum 14 og 16 ár og búgva í Tórshavnar kommunu, men er onkur eitt nú í skúla aðrastaðni og flytur aftur til kommununa í summarfrítíðini, kann viðkomandi eisini søkja.

Tilmeldingin á heimasíðuni www.torshavn.fo byrjar mánadagin 25. mai klokkan 8 og er úti fríggjadagin 5. juni. Ein serlig tilmeldingarskipan er gjørd til heimasíðuna, har tey ungu skulu útfylla ávísar teigar, og eftir lokna tilmelding verður lutakast um, hvør fær kjansin hesa ferð.

– Tíverri hava vit vanliga ikki pláss fyri øllum, sum melda seg til. Men hesa ferð er skipanin soleiðis, at tey, ið ikki fingu arbeiði síðsta summar, í størst møguligan mun fáa framíhjárætt, so tey fáa arbeiði hesa ferð. Tó vilja vit heita á øll ung, sum annars ganga undir treytirnar, um at søkja, sigur Linda Petersen, sum er samskipari av verkætlanini "Ung í arbeiði".

– Umframt, at vit sóknast eftir ungum, ið vilja sleppa til arbeiðis í tvær vikur í summar, sóknast vit eisini eftir bólkaleiðarum, ið kunnu standa fyri arbeiðinum hjá teimum ymsu bólkunum. Eisini tey kunnu søkja um starv umvegis heimasíðuna, og so finna vit tey best egnaðu.

## Arbeiða við gleði

Tað er Margarinfabrikkin, ið samskipar verkætlanina, tí har eru tey frammanundan von við líknandi uppgávur, so sum at arbeiða við verkætlanum, umframt at tey dagliga arbeiða við teimum ungu.

– Tí praktiska hava vit nógvar royndir av, og vit hava eisini allan tann neyðuga førleikan í húsinum, so tí er tað upplagt, at Margarinfabrikkin stendur fyri verkætlanini, sigur Bogi Andreasen, leiðari í Margarinfabrikkin, sum millum annað nevnir tað pedagogiska sum ein part av heildini.

– Vit eru von við at aktivera tey ungu, og tí kunnu vit eisini geva eitt nú bólkaleiðarunum góð ráð, tá teir skulu út at gera tað sama. Eisini hava vit ferð eftir ferð sæð, at gevur tú teimum ungu álit og ábyrgd, so vaksa tey við uppgávuni og fáa størri sjálvsálit, umframt at tey gera sítt arbeiði við gleði.

Linda og Bogi siga somuleiðis, at tey fegin hoyra frá fólki, sum hava uppskot um, hvat kann gerast av arbeiði í teirra nærumhvørvi. Á heimasíðuni hjá kommununi, har kunnað verður um »Ung í arbeiði«, ber beinleiðis til at koma við slíkum uppskotum, og eisini ber til at senda teldupost á linda@torshavn.fo.

Tað, sum tey ungu fara at gera, er alt møguligt, og tað kann bæði snúgva seg um at gera smáumvælingar, lúka, sópa gøtur, mála, rudda og annað – alt eftir tørvi.

Av tí at lutakast er millum tey, sum søkja um at fáa arbeiði, er tað líka mikið, um tú ert fyrstur ella síðstur at melda teg til. Arbeitt verður átta tímar um dagin, frá klokkan 8 til klokkan 16, og tey ungu verða sett eftir vanligum setanartreytum og lønt eftir sáttmálaavtalaðu tímalønini hjá Havnar Arbeiðsmannafelag.

